# Oljuinntøkur skulu mótroknast

*Landsstýrið mælir í nýggjum uppskoti til, at møguligar oljuinntøkur skulu mótroknast í blokkstuðlinum*

*John Johannessen og Eyðun Klakstein*

Á samráðingarfundinum við donsku stjórnina í gjár legði landsstýrið eitt nýtt uppskot um búskparliga skiftistíð fram. Landsstýrið skjýtur upp, at møguligar oljuinntøkur verða mótroknaðar í blokkstuðlinum.

Landsstýrið mælir til, at blokkstuðulin minkar stigvíst til hann er burtur um 15 ár. Um Føroyar fáa oljuinntøkur innanfyri næstu 15 árini, verður tann stuðulin, sum er latin eftir tey fýra árini, sum stjórnin vil lata í skiftistíð, roknaður sum lán og skal gjaldast aftur.

Landsstýrið sigur, at tað hevði verið órímuligt at tikið ímóti blokkstuðli í 15 ár, um Føroyar fáa trivaligar inntøkur frá oljuvinnuni, og óansæð hvør loysn verður vald, fer tað at hava við sær munandi sparingar fyri statskassan.

# Harða linjan ávirkar búskaparheimin

*John Johannessen Úr Keypmannahavn*

–Tað hevur uttan iva stóra ávirkan á føroyska búskaparheimin, at danska stjórnin framvegis nýtir skiftistíðina sum ræðumynd í fullveldismálinum.

Hetta sigur Høgni Hoydal í sambandi við, at danski forsætisráðharrin á tíðindafundinum hósdagin eftir ríkisrættarligu samráðingarnar enn einaferð gjørdi greitt, at búskaparliga skiftistíðin ikki verður longur enn fýra ár, samstundis sum hann samanbar livikorini í Føroyum uttan blokk við livikorini í øðrum londum í vesturheiminum.

Høgni Hoydal vísir á, at búskapur eisini er sálarfrøði, og at áhaldandi hørðu útsagnirnar frá danska forsætisráðharranum gera, at bankar og vinnulív kenna seg ótrygg.

–Tað er beinleiðis óhoyrt av forsætisráðharranum at rópa upp í miðlunum við hóttanum móti landsstýrinum. Hetta líkist ongum, staðfestir Høgni Hoydal.

# Samráddust í slakar fimm tímar

Føroyska landsstýrið og danska stjórnin sótu á fundi í slakar fimm tímar í gjár. Landsstýrið kom í forsætismálaráðið stutt fyri klokkan fýra og varð eitt sindur seinkað á samráðingarfundin av tíðindafólki, sum vildu hava orð á løgmann og varaløgmann.

Samráðingarnar endaðu umleið klokkan 9 hóskvøldið, og hálvan tíma seinni komu løgmaður og danski forsætisráðharrin á tíðindafundin, har føroyska og danska pressan var væl mannað.

Eini 10 føroysk fjølmiðlafólk dekkaðu samráðingarnar í Danmark, men eisini donsku fjølmiðlarnir vóru væl umboðaðir.

*Atli Dam, fyrrv. løgmaður um samráðingarnar:*

# Sjálvstýrisuppskotið hjá Javnaðarflokkinum eigur at verða roynt



*Atli P. Dam, fyrrverandi løgmaður*

Jan Müller

- Eg hevði alla tíðina væntað, at danir fóru ikki at góðkenna eina longri skiftistíð. Eg hevði eisini vantað, at í teirri støðu var landsstýrið noytt at royna at sparka bóltin longur fram á vøllin fyri at fáa tíð at umrøða seg. Men úrslitið verður í seinasta enda tað sama sigur Atli Dam, fyrrv. løgmaður í eini viðmerking til samráðingarnar í Danmark.

Hann sigur annars, at landsstýrið hevur handfarið samráðingarnar alt í alt ógvuliga illa, ófólkaliga og harðligt.

- Við slíkum kunnleika til søgu og kommunikatión átti landsstýrið ikki at brúkt slík kalliorð og tala um revolvarapolitik oa. men heldur havt nýtt orkuna til at roynt at fingið ta loysn, sum man veit kann savna tríggjar fjórðingar av føroyingum, og tað er sjálvstýrisuppskotið hjá Javnaðarflokkinum.

Atli Dam sigur, at eitt samráðingarumfar aftrat kemur einki at broyta. Hann heldur tó, at alt tað praktiska kanningararbeiðiðið, sum higartil er gjørt, kann nú brúkast í eini loysn, sum savnar eitt størri tal av føroyingum.

# Eingin nýggjur fundur ásettur

Tað er ikki greitt, nær næsti samráðingarfundurin millum landsstýrið og stjórnina verður. Á fundinum hósdagin avtalaðu partarnir at arbeiða víðari við ymsum tættum av samráðingunum, men tað varð ikki avtalað, nær partarnir skulu hittast aftur.

Vit hava skilt, at danski forsætisráðharrin hevur hug at draga samráðingarnar út til eftir donsku fólkaatkvøðuna um evruna, sum verður 28. september. Um hetta verður veruleiki, so hittast partarnir ikki aftur fyrr enn einaferð í august mánaði.

Annar møguleiki er, at næsti fundurin verður áðrenn fólkaatkvøðuna, og um so verður, er august mánaði eitt gott boð til næsta samráðingarumfar.

# Uttanlandsnevndin fylgdi samráðingunum

**Tíðindaskriv frá Uttanlandsnevnd løgtingsins Christiansborg 15. juni 2000**



Uttanlandsnevndin varð vald aftaná seinasta løgtingsval, og í nevndini sita: Hergeir Nielsen, formaður, Heðin Mortensen, næstformaður, Jógvan við Keldu, Edmund Joensen, Jóannes Ejdesgaard, Jákup Sverri Kass og Jenis av Rana.

Sambært stýrisskipanarlógini gevur Uttanlandsnevndin løgtinginum tilmæli í øllum uttanlands-, marknaðar- og verjumálum, eisini um viðurskiftini við Danmark, og hevur nevndin havt eina røð av kunnandi og ráðgevandi fundum — innanhýsis og saman við landsstýrinum og embætisfólkunum — um ríkisrættarligu støðu Føroya og í hesum sambandi samráðingarnar við donsku ríkisstjórnina.

Hóast ætlan landsstýrisins um at halda samráðingarnar við donsku ríkisstjórnina í trúnaði, so valdi danska stjórnin at ganga pørtum av andstøðuni á møti og gera tær almennar. Síðani tá hava øll skjøl verið almenn uttan eitt, sum liggur í Uttanlandsnevndini og er undirskrivað av Edmund Joensen, Jóannes Ejdesgaard og Marjus Dam.

Hóast almennu gongdina í málinum, so hevur hesin partur av andstøðuni fýlst á kunningar- og ráðgevingarstøðið, og upp til triðja samráðingarumfarið tann 15. juni hava frammanfyri nevndu harafturat hvassliga og skrivliga funnist at hesum.

Uttanlandsnevndin hevur viðgjørt hesi viðurskifti enn eina ferð, og nevndin heldur, at hon á fullgóðan hátt er kunnað av og hevur ráðført seg við landsstýrið undir allari málsviðgerðini av samskiftinum við donsku stjórnina.

Harafturat er Uttanlandsnevndin í tráð við arbeiðssetningin hjá nevndini, farin á fundarstaðið í Keypmannahavn til samráðingarumfarið 15. juni. Nevndin varð kunnað og ráðførdi seg við landsstýrið undan samráðingarfundinum, undir sjálvum samráðingunum og beinanvegin aftan á, at hesar vóru endaðar.

Uttanlandsnevndin heldur ikki, at tað er verkliga gjørligt at náa einum hægri og meira tíðarførdum kunningarstigi, og harmast um, at umboðini hjá Javnaðar- og Sambandsflokkinum frávelja møguleikan at taka lut í nevndararbeiðnum tá á stendur. Nevndin harmast eisini um, at hesir flokkar heldur nýta møguleikan at sáa iva um sjálvan arbeiðssetningin í teirri nevnd, sum løgtingið hevur hevur valt teir í.

Viðmerkt verður, at nevndarlimirnir hava ikki møtiskyldu, men standa til svars mótvegis flokkum, feløgum og veljarum sínum.

Soleiðis samtykt á nevndarfurni tann 15. juni 2000.

**Hergeir Nielsen, formaður**

*Rás 2 á Rás 2 leygardagin:*

# Íslendska Rás 2 beinleiðis á Rás 2 tjóðardagin

Leygardagin kl. 14 sendir íslendska Rás 2 beinleiðis á føroysku Rás 2. Talan er um eina samsending í sambandi við íslendska tjóðardagin.

Tað verður kendi íslendski útvarpsmaðurin Magnús Einarsson, sum verður vertur í eini beinleiðis sending við tónleiki og práti við lurtararnar.

—

Eins og føroyska Rás 2 gjørdi nógv burturúr norska tjóðardegnum 17. mai, so hevði Rás 2 avgjørt at senda tveir tímar leygardagin við íslendskum tónleiki og nøkrum innsløgum í sambandi við íslendska tjóðardagin. Hetta er tað, ið stendur á skránni.

Men hósdagin varð avgjørt at royna eina samsending við íslendsku Rás 2. Klokkan 14 leygardagin er sendingin "Á linunni með hlustendum" (á tráðnum við lurtarum) á skránni við kenda útvarpsmanninum Magnús R. Einarsson.

Hetta er ein undirhaldssending við práti og tónleiki, og leygardagin ber sendingin sjálvandi dám av, at tjóðardagur er í Íslandi, og prátað verður við fólk, sum ikki bert eru íslendingum kunnug, men eisini føroyingum.

Tað eru Eimskip og Føroya Tele, sum sponsorera sendingina.

Hetta merkir, at skráin verður nakað broytt leygardagin. KT-Rásin verður endursend kl. 13 ístaðinfyri kl. 16, tá Breytin verður endursend. Samsendingin við íslendsku Rás 2 verður sostatt millum kl. 14 og kl. 16 leygardagin.

"Á linuni með hlustendum" er ein tann mest vælumtókta útvarpssendingin á Rás 2 í Reykjavík, sum nú hevur 15 ár á baki.



*Hergeir Nielsen:*

# – Hugstoytt

*Formaðurin í Uttanlandsnevndini heldur tað vera hugstoytt, at danska stjórnin noktar at tosa um búskaparliga skiftisskipan við landsstýri. – Men hetta vísir bara, at danir vilja neyðhalda Føroyum undir teirra valdi, sigur hann*

Sveinur Tróndarson úr Keypmannahavn

Ein av teimum, sum hevur fylgt við samráðingunum í forsætismálaráðnum er Hergeir Nielsen. Hann er formaður í Uttanlandsnevndini hjá løgtinginum, sum hesaferð fylgdi samráðingunum av fyrstu røð. Hann heldur tað vera sera hugstoytt, at danir sópaðu alt av borðinum.

– Men í mínum hugaheimi vísir hetta bara, at danir vilja neyðhalda Føroyum í ríkisfelagsskapinum. Teir sópa alt av borðinum, sum lagt verður fyri teir, uttan so mikið sum at vilja tosa um tað. Stjórnin hevur, saman við fólkatinginum, læst seg fastan, sigur Hergeir Nielsen.

Spurdur hvat nú er til at taka, sigur Hergeir, at hann heldur at tað liggja aðrir møguleikar, sum landsstýrið enn ikki hevur roynt, og teir eigur landsstýrið at royna.

– Men annars eri eg samdur við landsstýrinum um, at tað nokk er skilagott, at altjóða samfelagið kemur upp í samráðingarnar, tí eg kann ikki hugsa mær, at danir ynskja at koma í ta mylluna.

Hergeir Nielsen vísir, eins og aðrir, á, at Danmark í altjóða høpi ofta hevur moralska peikifingurin frammi, men nú eru teir sjálvir í vanda fyri at fáa sama peikifingur í eyga. Hvør tað skal vera, sum skal royna seg, sum meklara, veit Hergeir ikki í løtuni, men fleiri møguleikar eru til staðar.

– Tað eru so nógvir møguleikar at fáa altjóða samfelagið upp í, sigur Hergeir. Hann nevnir sum dømi, at heita á Norðurlandaráðið – ella ST.

*Karsten Hansen:*

# Politiskur harðskapur

*– Í mínari verð, er her talan um politiskan harðskap tá hann er ringastur. Stjórnin noktar tvørt at tosað um annað enn tað, sum hon skjýtir upp, og teir gera tað fyri at ræða føroyingar til at vera verandi undir donskum valdi, sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður*

Sveinur Tróndarson úr Keypmannahavn

Karsten Hansen var ikki sørt vónbrotin eftir samráðingarnar. Hann hevði, eins og restin av føroysku sendinevndini væntað og vóna, at tað fór at bera til at fáa glið á búskaparliga partin av samráðingunum, men tað var av ongum. Danska stjórnin helt upp á sítt, og vildi heldur ikki tosa um, at geva føroyingum upplýsingar um, hvussu stjórnin er komin fram til tey fýra árini.

– Í mínari verð, er hetta politiskur harðskapur. Nyrup veit, at føroyingar hava ilt við at trúgva upp á tey fýra árini, og tí roynir hann at kroysta landsstýri út í eina fólkaatkvøðu við bara hesum fýra árunum, sigur Karsten Hansen.

Fyri Karsten hevur hesin tvøri atburður bara ein týdning, og tað er, at danska stjórnin brýtur avtaluna, sum hon sjálv gjørdi við Føroya Landsstýri fyri tveimum árum síðani. – Tað er eingin ivi um. Danska stjórnin, sum í alheims samanhangi, er tann moralski peikifingurin, letur hánt um ynski føroyinga, og rennur undan lyftum sínum, um at samráðast um eina búskaparliga skiftisskipan. Hetta varð avtalað í juni 1998, men nú noktar hon at samráðast, sigur Karsten Hansen.

Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum heldur seg síggja, at danski forsætisráðharrin hevur knýtt ov føst bond til bróðurflokkin í Føroyum, og tí vil hann ikki flyta seg.

– Danir hava jú lagt seg út í málið síðani byrjan. Teir sendu skattamálaráðharran upp til Føroya at prædika á landsfundinum hjá javnaðarflokkinum, og tað hevur bróðurflokkurin síðani trúttað niður í føroyingar. Tì er Nyrup bundin, og hann er bundin av egnum áum. Tað er einki at ivast í, at hann roynir at fáa landsstýri at leggja frá sær, so andstøðan kann koma framat, sigur Karsten Hansen.

– Og tí er tað, at Nyrup var so skjótur at skúgva orð Lykketofts til viks, um at ríkisveitingin hvørvur líkamikið um vit vera verandi ella um vit fara. Hann kann keypa andstøðuna til aftur, og halda henni har eina tíð, og síðani taka ríkisveitingina burtur, sigur fíggjarmálaráðharrin.

Men hetta eigur ikki at ræða føroyingar, tí hóast alt, so var ikki annað væntandi av dønum. Danir hava víst, at teir vilja varðveita Føroyar í ríkisfelagsskapinum líkamikið hvat tað kostar. – Men tað kann fara at vísa seg, at danir í altjóða høpi koma at gjalda ein sera høgan prís fyri hetta.

*Óli Breckmann:*

# – Hundurin ikki hálvbardur enn

*– Danska stjórnin ræðist tankan um at missa Føroyar, tí fara vit so er ikki óhugsandi, at Grønland fer sama veg, og tað heldur danska klaverið ikki til, sigur Óli Breckmann, aftaná triðja samráðingarumfar*

Sveinur Tróndarson úr Keypmannahavn

– Hóast danska stjórnin ikki vil samráðast, so eigur landsstýrið ikki at helma í fyrr enn avtalan er komin upp á pláss. Danir eru heilt greitt bangnir fyri at missa Føroyar, tí fara vit, so er ikki óhugsandi, at Grønland fer sama veg, og tað heldur danska klaverið ikki til, sigur Óli Breckmann, fólkatingslimur, sum var í forsætismálaráðnum, tá tíðindafundurin var.

Eftir hansara meting, so er útspælið hjá donsku stjórnini ógvuliga tætt knýtt at politisku andstøðuni í Føroyum, og so at teimum veljarakanningum, sum eru gjørdar í Føroyum seinastu tíðina.

– Nyrup avlesur veljarakanningarnar í Føroyum. Tær vísa, at undirtøkan ikki er fyri ætlan landsstýrisins, og so leggur hann bara nøkur ár afturat. Tá fáa hansara menn í Føroyum ein møguleika at koma framat, men um ikki annað, so eigur landsstýrið at halda fast bara fyri at gera Nyrup fortreð, sigur Óli Breckmann, sum ikki er serliga hugtikin av framferðarháttinum hjá danska forsætisráðharranum.

Men samstundis veit Óli Breckmann væl, at tað nokk er skilabetri at arbeiða við onkrari alternativari leið, heldur enn at halda fast við tað, sum nú liggur á borðinum.

– Tað er ein máti at koma víðari upp á, og í tí førinum er tað landsstýrið, sum ger av, hvørja leið tað velur, sigur Óli Breckmann.

Hann er tó ikki bangin fyri at koma við góðum ráðum, og peikar á tann møguleika, at landsstýrið ger eina avtalu við donsku stjórnina, sum bara landsstýrið og løgtingið góðtaka. Hetta merkir, at suvereniteturin ikki verður tikin við í fyrsta umfari, men nýtist ikki at merkja, at hon verður innanfyri ríkisfelagsskapin fyri tað.

– Landsstýrið hevur víst, at tað er sinnað at ganga langt fyri at fáa eina avtalu, men higartil hevur Nyrup bara sagt nei. Nú haldi eg so, at Nyrup skyldar Føroya fólki, at siga, hvat hendir, um hesin sáttmálin ikki kemur í lag, sigur Óli Breckmann.

Óli leggur afturat, at Nyrup skal vita, at sjálvstýriskreftirnar í Føroyum eru nógvar og góðar. - Hundurin er ikki hálvbardur enn, og tí eigur landsstýrið ikki at helma í fyrr enn stríðið er liðugt, sigur Óli Breckmann, sum ikki er bilsin av, at henda støðan er íkomin. – Hon er næstan mytologisk, leggur hann afturat.

– Danir halda, at teir hava uppfunnið heimsins bestu loysn, men tað kann fara at vísa seg at vera ein høgur prísur teir fara at gjalda. Hetta er oyðimarkargongd burturav, sigur Óli.

Annars fýrir Óli ikki fyri at siga, at hann heldur, at danir og sambandssinnaðir føroyingar púra hava misskilt útspælið hjá landsstýrinum um oljuna. – Tað vísir bara, at landsstýrið vill gera nógv fyri at fáa hetta upp á pláss. Danir avvístu hesum, men tá teir fara eftir oljuni, verður ógvuliga langt millum sambandsfólkini í Føroyum, sigur Óli Breckmann at enda.

*Lykketoft:*

# Blokkurin rýkur óansæð

*Danski fíggjarmálaráðharrin segði undir samráðingunum, at føroyingar undir øllum umstøðum skulu av við ríkisstuðulin. – Eru liviumstøðurnar í Føroyum betri enn í Danmark, so verður ríkisstuðulin tikin burtur, í einum um neyðugt, segði Lykketoft*

Sveinur Tróndarson úr Keypmannahavn

Undir samráðingunum millum Føroyar og Danmark í kvøld segði danski fíggjarmálaráðharrin, at føroyingar undir øllum umstøðum skulu venja seg við tankan um, at ríkisveitingin úr Danmark er ein saga blott – líkamikið um føroyingar taka fullveldi ella ikki.

– Danski fíggjarmálaráðharrin segði, at eru liviumstøðurnar í Føroyum á sama stigi, sum tær eru í Danmark, so verður ríkisveitingin tikin burtur í einum, um vit meta tað er rætt, sigur føroyski starvsbróður hansara, Karsten Hansen, sum tó sigur, at danir royna at fjala henda veruleika fyri føroyingum.

– Nyrup royndi tó at káva útyvir tað, sum fíggjarmálaráðharrin segði, tí tað var ikki akkurát tað, sum hann hevði brúk fyri, leggur Karsten Hansen afturat.

Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum fær stuðul frá Jørgini Nielsen, sum váttar orðini hjá Mogens Lykketoft. – Vit royndu at kroysta stjórnina til at koma við upplýsingum um teirra búskaparliga útspæl, men tað vildi stjórnin ikki tosa um. Tá segði Lykketoft, at sær danska stjórnin, at liviumstøðurnar í Føroyum eru hægri enn tær eru í øðrum pørtum av Danmark, so fellur ríkisveitingin burtur.

Móttøka

Í sambandi við at Texaco Faroes Group letur upp skrivstovu í Føroyum verður móttøka í hølum felagsins Undir Bryggjubakka 1, Tórshavn (har sum Advokatfelagið var) týsdagin 20. juni frá kl. 13.00 – 16.00.

Texaco Faroes Group

Sosialurin - 311820